# ÓLAVSØKAN Í SMIÐJUNI



**Allar original tekningarnar er til sølu**

**Vit bjóða okkum eisini til at leggja lit á allar 2000 tekningarnar, sum eru í Skemt bókunum og á frams ningini. Stødd eftir ynski**

**Opið er hesar tíðir:**

| | |
|---|---|
| Fríggjadagin | 26. juli frá 16-20 |
| Leygardagin | 27. juli frá 14-20 |
| Sunnudagin | 28. juli frá 14-20 |
| Mánadagin | 29. juli frá 14-20 |
| Týsdagin | 30. juli frá 16-20 |

**Við originalinum úr Sosialinum - síggj teir áðrenn grannin**




Borgarstjórin í Tórshavnar Kommunu:

# Vit eiga at lata upp urtagarðar í Havnini

**Jan Christiansen heldur, at stóru privatu urtagarðarnir í Havn eru ov afturlatnir fyri almenninginum at njóta. Fyri nøkrum árum síðani skipaði kommunan fyri, at Grasagarður varð latin upp, og nú eigur túrurin so eisini at koma til aðrar urtagarðar**

NÁTTÚRAN
*Ragnhild Ellingsgaard*



*Jan Christiansen heldur, at Tórshavn skal gerast eina grønari býur*

Ferðafólk hava ofta á munni, at Føroyar eru eitt av vakrastu londum í heiminum. Her verður serliga hugsað um ríku náttúruna, vit eiga rundan um okkum. Harafturímóti hava vit føroyingar meir enn so lyndi til at gloyma at virðismeta allar teir ríkdómar, ið liggja í Føroyum. Onkrir eru léttir at bera eyga við, meðan aðrir eru meira goymdir fyri almenninginum.

Í Havnini liggja eisini fleiri ríkdómar, sum vanligi borgarin møguliga ikki er varugur við. William Heinesen og John Davidsen hava báðir hálovað Havnini, og ofta góvu teir Fútagarðinum, Amtmansgarðinum og Dómaragarðinum nógv pláss í skriving teirra.

Hesir garðar eru leivdir av eini tíð, tá Havnin var rættiliga nógv øðrvísi enn í dag. Hetta var ein tíð, tá fólk dugdu at virðismeta tær gávur, ið náttúran gav teimum. Nakað, sum tey flestu av okkum í ein stóran mun hava gloymt í dag.

## Garðar privat ogn

Jan Christiansen, borgarstjóri í Havn, dylur ikki fyri, at hesir tríggir gomlu urtagarðar eru alt ov afturlatnir fyri vanliga borgarinum. Hetta eru tríggjar perlur, sum liggja mitt í Havnini, men hóast tað eru tey mong í tali, sum als ikki vita av hesum skattum.

– Vit í kommuni hava ofta tosað um, hvussu vit fáa opnað garðarnar fyri almenninginum, soleiðis av borgarin eisini kann njóta gott av vakra umhvørvinum, greiðir Jan frá.

Fyri nøkrum árum síðani skipaði Tórshavnar Kommuna fyri at lata upp Grasagarð, soleiðis at øll fingu møguleikan fyri at njóta eina løtu saman í hugnaliga umhvørvinum.

– Sjálvandi skal almenningurin hava møguleika fyri at kunna njóta tær perlurnar, sum náttúran gevur okkum. Trupulleikin er bara, at í summum førum eru perlurnar privat ogn, greiðir Jan frá.

Fyri nøkrum árum síðani vendi Tórshavnar Kommuna sær til ríkisumboðsmannin, sum tá var búsitandi í Amtmanshúsinum við einum spurningi, um tað ikki bar til at lata partar av garðinum upp fyri almenninginum.

– Men svarið var stutt og greitt nei, sigur Jan.

Hann greiðir víðari frá, at sjálvur hevur hann tó tosað við ein av ríkisumboðsmonnunum, sum fyrr hevur búð í húsinum, og hesin dugdi ikki at síggja nakran trupulleika viðvíkjandi ætlanunum hjá kommununi.

– Nú hava vit aftur fingið ein nýggjan ríkisumboðsmann, so nú er bara eftir at spyrja hana, greiðir Jan frá, og sipar hervið til, at ítøkiligar ætlanir eru um at lata upp perluna mitt í býnum.

## Býurin hevði fríðkast

Seinastu árini hevur Tórshavnar Kommuna gjørt nógv fyri at fríðka um býin, soleiðis at tað grøna í náttúruni kemur meir til sjóndar.

Millum annað er hampað runt um Heinesen's Hús og Sloan's Hús, og eisini eru fleiri av garðunum í býnum lækkaðir, soleiðis at ein betur fær útsýni yvir alt tað grøna, sum fjalir seg aftanfyri.

– Tað er synd fyri býin, at ov lítið av náttúrini sást. Til dagliga leggja vit einans merki til asfalt og grót. Meir grønt hevði avgjørt fríðka um býin, heldur Jan. Men sum nevnt, so er talan jú sum oftast um privatar ognir, og tí mugu samráðingar í gongd, um garðarnir skulu latast upp.

– Men hetta er avgjørt nakað, ið vit sum kommuna eiga at arbeiða enn meira við í framtíðini, sigur Jan Christiansen, borgarstjóri í Tórshavnar Kommunu.



*Teir stóru urtagarðarnir í Tórshavn eru flest allir privat ogn, og tí mugu samráðingar í gongd, um garðarnir skulu latast upp*